# Bygging av dansihøll heldur fram

**Á býráðsfundi í síðstu viku varð leiguavtalan millum Dansifrøi og kommununa endaliga góðkend, soleiðis av byggingin av húsinum hjá dansifelagnum í Gundadali kann halda fram**

BYGGITRÆTA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Ósemja hevur verið um hesa byggingina í Gundadali, men nú trætan er loyst. Dansifrøi kann sostatt halda fram við byggingini av dansihøllini*

Byggingin av dansihøllini hjá Dansifrøi í Gundadali hevur verið tarnað av trupulleikum og ósemjun, men nú kann felagið halda fram við byggingini. Ósemja var millum Dansifrøi og umsitingina hjá Tórshavnar kommunu, um hvussu byggimálið skuldi loysast.

- Eftir hópin av samskifti og fundum er nú endaliga staðfest, at Dansifrøi heldur fram við byggingini, og at bygningurin vónandi verður innilokaður í februar, um veðrið verður til vildar, sigur formaðurin í bygginevndini hjá Dansifrøi, Høgni B. Mikkelsen

Hann vísir á, at nú er endalig leigu- og samstarvsavtala gjørd við Tórshavnar kommunu um nýgslu av høllini til tey ungu í býnum.

- Dansifrøi vónar nú, at hetta byggimáli fær ein virðiliga enda, soleiðis at bygginevndin hjá Dansifrøi til komandi heyst kann bjóða limunum og teim ungu í Tórshavn, umframt øllum øðrum, umstøður, ið liva upp til nútíðarkrøv til eitt dansistað, vísir felagið á.

Felagið sigur seg eisini vóna at fáa eitt gott samstarv á Gundadalsøkinum til frama fyri ungu og eldri í Tórshavnar kommunum, nú bæði fimleikarfeløgini Ljósið og Havnar Fimleikarfelag fara undir at byggja nýggjar fimleikarhallir.

# Munandi færri flogferðafólk

**Bæði fráferðir og ferðafólk yvir flogvøllin í Vágum eru færri í november mánað í ár, enn í fjør. Tó er samlaða talið av ferðafólki fyrstu 11 mánaðirnar hægri enn 2007**

FERÐING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Um tað er fíggjarkreppa, svartskygni ella bara minni peningur millum fólk, sigur søgan onki um, men veruleikin er tanna, at tað ferðaust munandi færri fólk yvir flogvøllin í Vágum í november mánaða í ár, enn tað gjørdu í fjør. Talið av ferðafólki minkaði við 14,8 prosentum, og tað svarar á leið til, at sjeynda hvørt ferðafólk settist aftur ella valdi ikki at ferðast í ár í mun til í fjør.

Tó so, samlaða talið av ferðafólkum fyri fyrstu 11 mánaðirnar er framvegis hægri, 1,7 prosento vøkstri, enn tað var í fjør.

Fram til 1. Desember í fjør ferðaust 204.911 ferðafólk um flogvøllin, meðan talið í ár er 208.368. Í november í fjør vórðu flutt 14.974, meðan talið fyri sama mánað í ár fór niður á 12.752 ferðafólk.

Talið av flogførum um vøllin í november mánað í ár, er heili 31,4 prosent færri. Tað vil siga ein minking upp á næstan ein triðing. Meðan tað komu og fóru 487 flogfør í fjør, var hetta talið í ár heilt niðri á 334.

Afturgongdin í ferðafólkatalinum sæst aftur á øllum farleiðunum. Størst er hon tó á høvuðsleiðunum til og úr Keypmannahavn og Billund. Her er afturgongdin 10,4 prosent. Afturgongdin sæst á øllum slagi av komum og fráferðum, bæði rutu-, charter- og øðrum fráferðum. Her skal tó eisini havast í huga, at nakað av frálandaflúgving var í novembur í fjør. Hetta virksemi hevur ikki verið í novembur í ár.

Higartil í ár eru 5.090 flogfør komin og farin um floghavnina, svarandi til 1,3 prosent færri enn sama tíðarskeið í fjør.

Fyrstu 11 mánaðarnar í ár hevur flogfarmurin verið tilsamans 744,4 tons svarandi til eina afturgongd uppá 10,7 prosent.

Útgreinaði hagtøl finnast á heimasíðuni hjá Vága Floghavn www.floghavn.fo.



*Búskaparliga niðurgongdin sær eisini út til at hava rakt flogferðsluna, tí í november komu 14,8 prosent færri ferðafólk yvir flogvøllin, enn tað gjørdu sama tíðarskeið í fjør*
*Savnsmynd*

## Skemtið hjá Sjúrða á fløgu

**Í gjár kom út ein DVD-fløga av framførslunu »E elski Førjar live 2008«, sum vóru í Norðulandahúsinum í summar**

ÚTGÁVA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Skemtisendingarnar hjá Sjúrða Skaale og øðrum, sum vórðu senda í føroyska sjónvarpinum tíðliga í vár, »E elski Førjar«, vóru síðani settar upp sum pallframførslur í Norðurlandahúsinum í summar.

Nú er ein dvd-fløga komin frá framførslunum í juli, sum hevur heitið »E elski Førjar live 2008«.

Framleiðslan er gjørd á tann hátt, at tvær framførslur vórðu tiknar upp við fýra upptøkutólum, og ljóðið varð tikið upp fyri seg. Síðani er alt tilfarið klipt saman til eina hálvanannan tíma langa sending við hægstu teknisku góðsku.

Figurarnir úr sjónvarpssendirøðini luttaka flest allir við nýggjum tilfari, men harumframt eru fleiri nýggir figurar, sum gjørdust sera vælumtóktir í summar. Ikki minst norðmaðurin Torvald og tær rumensku flakakvinnurnar, Kela og Análga.

Harumframt eru nýggir sangir og tónleikur.



*Frá framførsluni av E elski Førjar live 2008 í Norðurlandahúsinum, ið nú er givin út sum fløga við nýggjum figurum, nýggjum tilfari og nýggjum sangum*